

## Sjey umsóknir

Áhugin fyri at gerast havnafúti í Klaksvík er stórur.

Sjey umsóknir eru til starvið.

Í hesum døgum eru setanarsamrøður, og tað ganga neyvan fleiri dagar, til starvið verður sett.

## Gongur seint við samráðingunum

**Hóast sáttmálarnir hjá teimum fýra stóru feløgunum á almenna arbeiðsmarknaðinum fór út gildi 1. oktober, skunda partarnir sær ikki við at gera nýggjar sáttmálar**

Randi Jacobsen

Enn er einki at frætta frá samráðinginum millum almenna fakfelagssamstarvið øðrumegin og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið hinumegin.

Í seinastu viku var ein fundur, og tá varð avtalað at hittast aftur í næstu viku.

Líkt er til, at hvørgin parturin hevur skund at fáa nýggjar sáttmálar.

Í almenna fakfelagssamstarvinum eru Føroya Lærarafelag, Starvsmannafelagið, Havnar Arbeiðskvinnufelag og Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Samráðst hevur bæði verið í felag og einsæris um serkrøv.

So leingi samráðst verður, vil einki felag upplýsa nakað frá samráðingunum.

Krøvini hjá pørtunum eru heldur ikki almenn enn.

Sáttmálarnir gingu út 1. oktober, men so leingi samráðst verður, verður arbeitt eftir gomlu sáttmálunum.

Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum hevur gjørt greitt, at í ár er ikki rúm fyri nøkrum lønarvøkstri. Feløgini hava mótmælt tí fráboðanini, sum tey meta vera at gera seg inn á samráðingarrættin.

Samstundis sum samráðst verður, viðger løgtingið uppskotið til nýggja fíggjarlóg, har ásett verður, hvat almenna stovnarnir skulu klára seg við næsta ár.

# Hótta Norrönu við blokadu

**Tíðindi ganga nú um, at havnaarbeiðararnir í Esbjerg vilja hava felagið 3F at blokera Norrønu í Hirtshals, tí dekkararnir á skipinum surra sjálvir umborð**




*Í Esbjerg fóru lokalu havnaarbeiðararnir umborð at surra, men soleiðis er ikki aðrastaðni*

Randi Jacobsen

Tá ið Norrøna sigldi til Esbjerg, fóru teir lokalu havnaarbeiðarnir umborð at surra.

Men soleiðis er ikki í øðrum donskum havnum.

Tá nú Norøna fór at sigla til Hirtshals, valdi Smyril-line at gera sum onnur reiði gera at lata manningina sjálva gera hetta arbeiði.

– Tað er rætt, at vit hava hoyrt graml um, at teir í Esbjerg vilja hava stóra felagið 3F at blokera Norrønu í Hirtshals, sigur Rúni Olsen, maritimi leiðarin á Smyril-line.

Enn er tó einki hent.

Havnaarbeiðarnir í Esbjerg hava eisini ført fram, at manningin á Norrønu ikki er í fakfelag.

– Tað er ikki rætt, tí øll manningin er limur í Føroya Fiskimannafelag, sigur Rúni Olsen.

# Fagnaðurin heldur fram

Randi Jacobsen

Savnsfagnaðurin byrjaði sunnudagin við útferð til Gjárar, og alla hesa vikuna verða alskyns tiltøk til børn og vaksin.

Hjá børnunum liggur í hvussu er væl fyri at luttaka, nú skúlarnir eru í heystfrí.

Hvønn dag í vikuni eru tónleikatiltøk í Tutl á Káta Horninum í Havn. Tónleikurin er tengdur at evnunum, sum Savnsfagnaðurin snýr seg um.

Í Miðlahúsinum verða hvørt kvøld tveir styttri fyrilestrar og ein tónleikaløta við kensum føroyskum tónleikarum. Tey fýra søvnini standa fyri hvør sínum kvøldi frá mánadegi til hósdag, Fríggjakvøldið verða vinnararnir av Savnsfagnaðarkappingunum heiðraðir, og ein almenn savnsfaganarquiz verður eins og ein tónleikarløta.

Myndir frá teknikappingini verða at síggja bæði í Miðlahúsinum og á Býarbókasavninum.

Endamálið við tiltøkunum er at vísa á, at vísindi og list ikki eru ólík, tí bæði krevja kreativitet og eygleiðing.

# Poppkorn av hillunum

**Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur afturkallað mikroovnspoppkorn av merkinum COOP við smørsmakki**



Fríggjadagin boðaði Heilsufrøðiliga Starvsstovan frá, at mikroovnspoppkorn av merkinum Coop við Smørsmakki antin skal latast inn aftur í handilin, har vøran varð keypt, ella má vøran beinast burtur.

Vøran er pakkað í tríggjar ferir 100 gramms pakkar.

Orsøkin til afturkallingina er, at mjólkaprotein ikki er merkt í tilfarslistanum.

Fólk, sum eru ovurviðkvom ella ikki tola mjólk, kunnu fáa allergiska reaksjón av vøruni.